

## Kvotan minkar 300.000 tons

À fundi í Føroyum fríggjadagin samdust strandarlondini Føroyar, ES, Ísland og Noreg um at skerja heildarkvotuna eftir 300.000 tons næsta ár, út 2 milliónum tonsum í 2006 niður í 1,7 millión tons í 2007.

Næsta ár verður føroyska kvotan sostatt 444.125 tons og tað eru 80.000 tons minni enn í ár.

Í fjør gjørdu strandarlondini fleirára avtalu um svartkjaftastovnin og eftir henni skuldi heildarkvotan minkast minst 100.000 tons um árið frá 2007.

Seinastu vísindaligu metingarnar benda tó á, at sal fiskiskapurin verða burðardyggur, er neyðugt við enn størri skerjingum.

Tí varð semja um at skerja kvotuna 300.000 tons og tað er eitt stig á leiðini at tryggja ein langtíðar burðardyggan fiskiskap, samstundis sum vinnan fær umstøður at tillaga seg.

# Hesum mugu vit læra okkum at liva við

**- Eg hevði væntað, at kvotan av svartkjafti fór at lækka og eg vænti, at hon fer at lækka enn meiri, sigur Atli Hansen, reiðari**

SVARTKJAFTUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Svartkjaftakvotan minkart skjótari, enn vit hava avtalað, men hetta mugu vit læra okkum at liva við og vit skulu eisini fyrireika okkum upp á, at hon fer at minka enn meiri, sigur Atli Hansen, reiðari*

Tað kemur ikki óvart á tey, sum arbeiða í svartkjaftavinnuni, at kvotan á svartkjafti minkar.

Atli Hansen, reiðari, sigur, at hann hevði væntað eina lækking.

– Støðan er bara tann, at nú er svartkjaftakvotan lækka nógv meiri, enn londini upprunaliga vóru samd um.

Heildarkvotan hevur verið tvær milliónir tons og londini samdust um at lækka hana 100.000 tons um árið.

Næsta ár lækkar hon so 300.000 tons, niður á 1,7 milliónir tons og tað er meiri enn avtalað.

– Men hetta er tað, sum vit mugu læra okkum at liva við og eg ivist ikki í, at kvotan fer at lækka enn meiri, sigur Atli Hansen.

Ices mælir til, at vit ikki fiska meiri enn 900.000 tons næsta ár.

### Føroyska kvotan minkar 80.000 tons

Eftir nýggju avtaluni verður føroyska svartkjaftakvotan 444.125 tons og tað eru 80.000 tons minni enn hon er nú, sigur reiðarin í Gøtu.

Og tað er púra greitt, at hetta kemur at merkjast so ella so.

– Eitt er, at tað verður minni at fiska. Men tað verður eisini minni at handla við og lata av afturfyri kvotur í fremmandum sjógvi.

Svartkjaftakvotan hevur verið nógv brúkt sum gjaldoyra fyri kvotur í russiskum sjógvi, men teir møguleikarnir verða kanska skerdir nú

Tað kann raka føroysku kvoturnar av botnfiski í Barentshavinum.

Men Atli Hansen heldur, at tað fer at fáa uppaftur størri ávirkan, vísir tað seg at halda, sum vit hava varnast hesa seinastu tíðina – at svartkjafturin hevur tikið sítt gamla mynstur uppaftur

– Tað gamla plagdi vera at svartkjafturin var at fáa frá fyrst í árinum til mai mánað út. Men í nøkur ár hevur svartkjaftur verið at fáa alt árið.

– Men fyri tveimum árum síðani vóru tekin um, at svartkjafturin var farin at taka gamla mynstrið uppaftur. Ì fjør var tað enn týðiligari og í ár hevur tað sligið heilt ígjøgnum, tí seinna hálvar er svartkaftur ikki dripin.

– Sostatt sær út til, at svartkjafturin aftur er farin at líkjast sær sjálvum

Atli Hansen metir, at hetta er tekin um, at svartkjafturin aftur er farin at minka.

– Tað sær út til, at vit hava havt ein ella tveir góðar árgangir í fiskiskapinum, men nú eru teir farnir at ganga undan. Samstundis er metingin, at árgangirnir, sum nú er á veg í fiskiskapin eru meiri vánaligir.

Hann sigur, at í ár er føroyska kvotan 525.000 tons. Men tá ið vit hava handlað aftur og fram við kvotum, eru 338.000 eftir, sum føroysk skip kunnu fiska. Ein leyðslig meting sigur, at føroysk skip hava fiskað eini 300.000 tons í ár, so tað er á einari leið.

Hetta, og so tað, at kvoturnar minka, verður helst ein veruleiki, sum vit noyðast at laga okkum til, heldur reiðarin í Gøtu.

# Føroya Banki og Landsbanki Íslands býta um list

Í sambandi við 100 ára føðingardagin hjá Føroya Banka og 120 ára føðingardagin hjá Landsbanka Íslands býta bankarnir um málningalist komandi mánaðin

Vinarlagið millum Føroya Banka og Landsbanka Íslands hevur verið gott í mong ár, og nú føðingardagarnir verða hildnir, fingu bankarnir so tað hugskot at býta um málningar.

Báðir bankarnir eiga nógva virðismikla málningalist. Føroya Banki eigur serstakliga nógvar málningar eftir Mikines, Ingálv av Reyni og Zacharias Heinesen, og tað eru málningar hjá hesum trimum, sum nú verða sýndir fram hjá Landsbanka Íslands.

Á høvuðsskrivstovuni hjá Føroya Banka í Húsagøtu í Havn verða afturfyri sýndir fram málningar hjá trimum íslendingum, Eggert Pétursson, Jóhannes Kjarval og Kristján Davíðsson. Innboðin fernisering var í Føroya Banka leygardagin, har stjórarnir í Føroya Banka og Landsbanka Íslands hildu røður.

Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka, segði millum annað:

„Hugskotið at býta um list í nakrar vikur er sprottið úr einum sterkum vinarlagi millum Landsbanka Íslands og Føroya Banka. Nú hátíðardámurin hjá bankunum báðum er í hæddini, halda vit hesa listaumbýting geva hátíðarhaldunum røttu litirnar. Vit heilsa íslendingum vælkomnum at síggja føroyska list í Landsbanka Íslands, eins og vit bjóða føroyingum vælkomnum at síggja íslendska list í Føroya Banka."

Almenningurin fær høvi at síggja framsýningina í Føroya Banka í november. Nærri verður lýst um hetta.

